TING-HELLAN

# anin læruna?



Savnsmynd



*Ástøðið hjá Darwin er fleiri hundrað ára gamalt og nógv útskeldað, men eigur ikki at verða samanborið við átrúnað, heldur onkur.*

læru og skapanarlæru. Vit hava tosað við fleiri lærarar, sum undirvísa í lívfrøði. Teir vilja ikki hava navnið við í blaðið, men eftir hvat Sosialurin skilir, so kann tað tykjast torført at greiða frá bæði Darwin og skapanarlæru.

- Eitt er at kunna, men eitt annað er at kritisera. Næmingarnir eru forvitnir og ikki óvitandi og duga at seta spurnartekin, og oftani kann tað tykjast torført at undirbyggja hugtøkini, sigur ein lærari, Sosialurin hevur tosað við.

Allir lærararnir, vit hava tosað við, leggja eina við, at teirra persónligu sjónarmið vera skild at frá undirvísingini. Hóast nakrir næmingar leggja nógvu orku í tað andaliga í fólkaskúlaárunum, so meta lærarnir ikki, at spurningurin um menningar- og skapanarlæru fyllir nógv í huganum hjá næmingunum.

**Ikki sambærilig**

Í vikuni hevði Pól Jespersen, cand.scient, studentaskúlalærarin og høvundurin á einari røð av nýggjum føroyskum alisfrøðibókum, viðmerkingar til skrivingina í Tinghelluni í farnu viku.

Pól Jespersen leggur í sínum viðmerkingum dent á, at vísindi og átrúnaður eru hvørt sítt. Menningarlæran og skapanarlæran er ikki ein spurningur um at velja annaðhvørt teirra, ella at tað eina útilokar hitt. Tað ber snøgt sagt ikki til at samanbera, heldur Pól Jespersen.

Skrivingin hjá teimum fýra, Símun Absalonsen, Richard Schwartson, Ejvind Mouritsen og Jens Andreasen, fellur sum heild væl uttan fyri tað, ið Pól Jespersen kann taka undir við.

Hann kallar teirra viðmerkingar fyri høpisleysar og langt av leið.

- Eg ætli mær ikki at kjakast vit teir fýra, tí tað ber ikki til at kjakast við fólk, sum vita svarini frammanundan, men eg vóni, at fólk, sum hava skil fyri vísindum, og serliga lívfrøði, fara at taka til orðanna ímóti tí, hesir fýra bera fram, sigur Pól Jespersen.

Tað lata vit so fara víðari. To whom it may concern.